# Næmingar krevja lærarar til roynd

**Skúlanæmingar og politiska ungmannafelagið Venstres Ungdom í Danmark skjóta nú upp at lærarar eisini skulu upp til roynd. Teir lærarir, ið dumpa mugu úr starvi. Lærarar halda lítið um uppskotið.**

UNDIRVÍSING
*Snorri Brend*



*Gongur sum danska næmingafelagið og eitt politiskt ungmannafelag ynskja, so sleppa lærarar ikki undan at fara upp til roynd í framtíðini. Hesir næmingarnir í Húsa skúla hugsa neyvan um tað*

*(savnsmynd)*

Næmingar í donsku fólkaskúlunum koma framvegis at hava sínar royndir sum vant í fleiri lærugreinum. Men lærararnir, - teir sleppa undan slíkum royndum, sum kunnu vísa, um teirra fakliga støði er nóg høgt. Hetta ynskja næmingarnir nú at broyta, so at lærarar teirra eisini skulu upp til royndir fyri at hækka fakligheitina.Tað heldur í øllum førum formaðurin í felagsskapinum Danske Skoleelever. Við Jyllands-posten sunnudagin segði Alexander Petersen, at tað er eitt gott hugskot at nýta sama máta mótvegis lærarunum, sum teir nýta mótvegis næmingunum.

- Teir flestu lærararnir eru væl fyri fakliga, men alt ov fáir av teimum vánaligu lærarunum verða koyrdir úr starvi, heldur hann.

Formaðurin í næmingafelagnum stuðlar við hesum eisini einum uppskoti frá ungmannafelagnum hjá danska Vinstraflokkinum. Tað ynskir nevniliga at innføra eina nýggja skipan við royndum sum í dag verður brúkt í USA.

- Tess betri lærararnir eru, tess betri frálæru fáa næmingarnir, sigur VU-formaðurin, Karsten Lauritsen. Hansara ynski er at lærarar skulu til roynd í pædagogiskum og fakligum evnum. Henda amerikanska royndin varð sett í gildi av fyrrverandi amerikanska forsetanum, Bill Clinton, tá hann var guvernørur í Arkansas í 1984.

# - Endamálið er bert at revsa lærararan

**- Tað er neyðugt hjá øllum lærarum, sum eru í starvi í dag at menna seg fakliga. Tað, sum er vandamikið í slíkum amerikanskum skipanum, er, at ætlanin er ikki at gera førleikan hjá lærarum betri, men heldur siga upp og revsa teir, sigur formaðurin í Lærarafelagnum, Magnus Tausen**

SKÚLAROYNDIR
*Snorri Brend*

Bæði næmingafelagið í Danmark og politiska ungmannafelagið hjá Vinstraflokkinum eru samd um, at lærararnir skulu upp til roynd, á sama hátt sum næmingarnar *(sí aðra grein á síðuni)*.

Hesa ætlan, hvørs hugskot kemur úr USA, halda donsk skúlafólk lítið um. Og tað ger formaurin í føroyska lærarafelagnum eisini. Magnus Tausen hevur nevniliga sjálvur roynt at starvast sum lærari í USA.

Lærararnir í USA vóru nevniliga nógv merktir av, at næmingarnir skuldu til roynd á hvørjum ári.

- Henda royndin gjørdi av, um lærarin fekk lønarhækkan ella kanska varð sagdur úr starvi, greiður Magnus Tausen frá.

### Tørv á betri skipanum

Í USA var undirvísingin løgd soleiðis til rættis, at næmingarnir gjørdust serfrøðingar í at loysa júst hesar royndaruppgávurnar.

- Undirvísingin var tí als ikki nøktandi, men næmingarnir stóðu seg framúr væl í royndunum, sigur Magnus Tausen.

Hann vísir á, at vit í Føroyum eru helst einki undantak, tá ið tað kemur til fakligan førleika hjá lærarum, eins og tað er galdandi fyri aðrar verkabólkar í Føroyum.

- Vit mugu tí fáa nógv betri skipanir, tá ið tað kemur til eftirútbúgving hjá lærarum. Sjálv læraraútbúgvingin skal bara vera byrjanin til lívslanga læru.

- Nýtt tilfar og nýggir miðlar broyta skúlan og alt samfelagið so skjótt, at ein og hvør útbúgving "eldist" skjótt, sigur formaðurin í Lærarafelagnum.



*- Tað ger ongan skúla betri, at lærarar verða hóttir við uppsøgn, slær formaðurin í Lærarafelagnum, Magnus Tausen fast*

### Eitt negativt stempul

Í greinini verður víst á, at í 1984 dumpaðu 10 % av lærarunum, tá royndirnar vórðu innførdar av távernandi guvernørinum, Bill Clinton.

Tað, sum er ódámligt í hesi skipinini, er, at lærarar skulu til roynd og kunnu dumpa.

Ætlanini við skipanini var tí ikki á nakran hátt at gera lærararnar dugnaligari, men heldur at stempla teir sum ódugnaligar.

- Lærarar eru ymiskir, og tað er ómøguligt at seta ein frymil á hvat tann "góði lærarin" er, tí eingin lærari kann rúma øllum.

- Tí kann tað meira enn so koma fyri, at í teimum 10 %-unum sum dumpaðu eru stak dugnaligir lærarar. Men teirra dugnasemi var kanska ikki so lætt at máta, sigur Magnus Tausen.

## Neyðug PISA-kanning

Í næstum fer Mentamálaráðið at skipa fyri teim sonevndu PISA-kanningunum.

Í øðrum londum hava hesar kanningar ført við sær, at lærarar rættiliga eru komnir í andglettin. Serliga í Danmørk hevur hetta verið ein trupulleiki.

- Men, slær Magnus Tausen fast. - Tað ger ongan skúla betri, at lærarar verða hóttir við uppsøgn.

- Landsstýrismaðurin í mentamálum eigur, í sambandi við 2015 visiónina at styrkja møguleikarnar hjá lærarum at útbúgva seg meira. Sjálv læraraútbúgvingin skal eftir ætlanini verða broytt, men tað er ikki nóg mikið.

Við PISA-kanningini kunnu vit bera okkara skúlaskipan saman við aðrar. Tað kann verða brúkt skilaliga, t.d. við at styrkja lærarafø̈rleikan.

- Vit mugu staðfesta, at eingin útbúgving er tíðarleys. Reglulig eftirútbúgving má til.

- Eitt tað fremsta málið hjá Lærarafelagnum verður at tryggja, at tað gerst úrslitið av PISA-kanningini, sigur formaðurin at enda.